# Nøvn

## Dagurin

4. juni. Obtatus, deyður umleið ár 390. Var upprunaliga heiðin maður, sum gjørdist kristin og endaði sum biskupur í Milevis í Numidiu. Hann doyði strádeyðan.
***(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)***


TØKK

Við hesum takki eg hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 90 ára føðingardegi mínum.

Tað fløvaði og vermdi.

***Við heilsan***

***Elin Mortensen***



TØKK

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá góði sonur og bróður okkara

**Karl Jákup Petersen**

so brádliga andaðist og varð jarðaður.

Hjartans tøkk øll somul.

***Mamma og systkin við familjum***



TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elska kona og mamma okkara

**Jórun Askham**

andaðist og varð jarðað

***Nils, Rannvá og Durita***


# Føroyingar á Norðfjørðinum

Tá ið Óli Jacobsen í apríl var á Norðfjørðinum við einum bólki hjá Smyril Line, kom hann í samband við Gudmund Sveinsson, sum stendur fyri Skjala- og Myndasafn Norðfjarðar. Hetta savn hevur eisini myndir av føroyskum skipum og fiskimonnum á Norðfjørðinum.

Óli hevur frá Guðmundi fingið hesar frálíku myndir av Vesthavet og manning á henni, sum er í ferð við at landa fisk. Um onkur kennist við nakran á myndini vilja vit fegin frætta. Tlf. 315769 og 285769.




*Kennir nakar hesi fólkini?*



*Vesthavet*

*Framhald av síðu 15*

og skúlarnir fara undir nýtt skúlaár, er kallurin í fremstu røð, tá ið fjøld av fólki tekur seg niðan á Skarð á fólkafund uml. fyrsta sunnudag í august. Tað er Petur Martin, sum stílar fyri. Hann hevur nú í meira enn 10 ár tikið stig til hesa løtu – niðan til heimsins størsta varða, sum sigur sína søgu um fólkið, sum er farið til Elduvíkar, Oyndarfjarðar og yvir á Hellur, og so øvugt - hava leitað sær til bygdirnar sunnanfyri - Fuglafjørð, Leirvík og Gøtu. Portrið á Skarðinum er ímyndin av portrinum út í heim og inn í heim. Her varð steðgað á, og 3 steinar vórðu lagdir afturat hesum vegleiðara. Meðan steinarnir vórðu tveittir, varð sagt: »Gud fader, Guds søn og Gud den helligånd.« Alt hetta grýtið er vælsignað av mannahond og tí tríeinda Guði. Hugsa tær til, øll tey fólk í túsundatali , ið hava lagt stein afturat hesari pyramidu. Høvdu teir verið eins stórir, sum teir, ið fóru til Keopspyramiduna, so hevði hesin varði rokkið til Himmals. Tá hevði lítið verið um Keopsvarðan í Egyptalandi.

Tá ið farið verður undir fólkafundin, situr fólkið kring varðan, Petur Martin bjóðar øllum at verða vælkomin, sangir verða sungnir og tala hildin. Tað eru longu nógv fyndarorð søgd á hesum stað, sum hava fest seg í teir guddómligu steinarnar. Hetta er ein góður máti á ein slíkan hátt at enda summarið. Petur Martin er sera poetiskur, tí fær hann hetta at bera til, og vit onnur njóta gott av hansara skaldakenda verumáta.

Ja, Petur Martin, nú verður tú seksti fimm ár, og eg skal siga tær, at tað er ikki so galið at vera komin so langt á leiðini. Skrúvan gert léttari, vit flóta betur, og unnustur okkara fara at hjúkla uppaftur meira um okkum. Nærri impressionistisku heimslistini kanst tú ikki koma.

Hjartaliga til lukku

**Frits**